## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og ÷5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, um kvøldið snarar hann í landnyrðing. Kavaælingur, men eisini onkur sólglotti og hitalagið millum 0 og ÷3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin frískar hann vindin av landsynningi. Sunnudagin upp í frískan vind av landsynningi og eystri og avfall, sum frálíður regn. Hitin báðar dagar millum frostmarkið og 4 stig.

– – –

Árið 2003 var ógvuliga lýtt, miðalhitin var 7,8° móti 6,6°.
Avfallið var 1253 mm móti 1451 mm.

Fyrstuhjálparhandbókin:

# Ímillum Bíbliuna og kókibókina

**Tann fyrsta fullfíggjaða Fyrstuhjálparhandbókin á føroyskum er nú komin á gøtuna. Ætlanin er at geva vegleiðing um viðgerð av teimum vanligastu skaðunum, sum fólk fáa eftir óhapp og vanlukkur**

ÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*

Føroyingar kunnu nú nema sær kunnleika um fyrstuhjálp á føroyskum máli. Tann fyrsta bókin av sínum slag sá dagsins ljós týsmorgunin.

– Tann, sum hevur verið vitni til eina vanlukku ella hevur verið partur í eini slíkari, veit av royndum, hvussu skelkandi ein slík uppliving er; afturat hesum kemur tað ráðaloysi, sum ofta valdar í slíkum umstøðum, tí ongin rættiliga veit, hvussu berast skal at, áðrenn serkøn hjálp kemur á staðið, sigur Richard Schwartson, farmaceuter, ið hevur týtt bókina úr enskum.

– Tað, sum eyðkennir eina vanlukku, er, at eingin er fyrireikaður til tað, sum hendir, eingin hevur neyðuga førleikan at hjálpa, og ofta skulu skjótar avgerðir takast, og hjálp veitast teimum løstaðu, inntil serkøn hjálp kemur fram, sigur týðarin. Endamálið við bókini er at brynja vanlig fólk til at veita hjálp, tá fólk hava fingið skaða.

Ætlanin við bókini er eisini, at hon skal vera ein eggjan hjá fólki at fara á skeið í fyrstuhjálp. Tað er nevniliga ikki altíð nóg mikið bert at lesa sær kunnleika.

Útgevararnir siga skemtandi, at ætlanin er, at bókin skal fáa pláss millum Bíbliuna og kókibókina á hillini í øllum føroyskum heimum.

### Stuðul til útgávu

Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið gevur bókina út við stuðli frá Føroya Oljuídnaðarbólki, sum hevur latið 300.000 krónur til hesa útgávuna.

Niels Jákup Thomsen, leiðari á bókadeildini, sigur, at tað var Richard Schwartson, ið kom við uppskotinum um at geva eina slíka bók út, og tá stuðul fekst frá oljuvinnuni, var eingin forðing fyri at geva hana út.

Bókin er 288 síður og kostar 98 krónur, og hon fæst til keyps í bókasølum og Shell- og Statoilstøðum kring landið. Harumframt fæst ein stuttur bóklingur ókeypis um bráðneyðuga fyrstuhjálp, sum er hentur at hava í bilinum og á útferð.




*Richard Schwartson (vinstrumegin) hevur týtt bókina »Fyrstuhjálpar Handbókin« til føroyskt. Hann hevur fingið holla hjálp frá Høgna Djurhuus, serlækna og yvirlækna í intensivari viðgerð og narkosu, og frá øðrum læknum og portørum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | ÷4 |
| Halifax | ÷19 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | ÷1 |
| Lerwick | 1 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 4 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷4 |
| Keypmannah. | ÷3 |
| Helsinki | ÷6 |
| Moskva | ÷4 |
| Berlin | ÷5 |
| Warzawa | ÷5 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | ÷8 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 6 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 10 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | ÷7 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 35 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 990 hPa. við Vestur-Noreg fer suðureftir og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft framvegis móti Føroyum.




Millum ein hátrýstrygg yvir Atlantshavinum og lágtrýstini við Noreg rekur køld luft enn móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/01 kl. 06⁰⁰– 27/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷1,2°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 26/01 kl. 06⁰⁰–27/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 154,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

19. januar: Mánin næstur jørðini
21. januar: Tendring
29. januar: Fyrra kvarter
31. januar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. jan | 11.35 | 23.55 | 10.35 | 22.55 | 10.50 | 23.10 | 01.15 | 13.35 | 02.15 | 14.35 | 09.50 | 22.10 | 08.50 | 21.10 | 11.50 | — | 00.30 | 12.50 | 11.20 | 23.40 | 00.15 | 12.35 |
| 29. jan | — | 12.29 | 11.29 | — | 11.44 | — | 01.55 | 14.29 | 02.55 | 15.29 | 10.44 | 23.19 | 09.44 | 22.19 | 00.10 | 12.44 | 01.10 | 13.44 | — | 12.14 | 00.55 | 13.29 |
| 30. jan | 01.04 | 13.44 | 00.04 | 12.44 | 00.19 | 12.59 | 03.04 | 15.44 | 04.04 | 16.44 | 11.59 | — | 10.59 | 23.29 | 01.19 | 13.59 | 02.19 | 14.59 | 00.49 | 13.29 | 02.04 | 14.44 |
| 31. jan | 02.14 | 14.36 | 01.14 | 13.36 | 01.29 | 13.51 | 04.14 | 16.36 | 05.14 | 17.36 | 00.29 | 12.51 | 11.51 | — | 02.29 | 14.51 | 03.29 | 15.51 | 01.59 | 14.21 | 03.14 | 15.36 |

5 707265 100036 >